# Profilur rýmir úr Sjálvstýrisflokkinum

**Fyrrverandi formaður í Unga Sjálvstýrinum og velevni til seinastu tvey løgtingsvalini hevur tikið seg úr flokkinum eftir landsfundin um vikuskiftið. Hann heldur, at Sjálvstýrisflokkurin ger einki munagott við støðuna, sum flokkurin er komin við minkandi undirtøku**

POLITIKKUR

*Eyðun Klakstein*

*eydun@sosialurin.fo*



*– Tað er eingin vilji í Sjálvstýrisflokkinum til at gera nakað munagott við støðuna, sum flokkurin er komin í, sigur Kenneth Rasmussen, sum hevur tikið seg úr Sjálvstýrisflokkinum*

*Mynd: Edvard Joensen*

Sjálvstýrisflokkurin hevur nú mist ein av sínum ungu og lovandi politikarum, sum seinastu árini hevur verið við til at mynda flokkin bæði í Føroyum og uttanlands.

Kenneth Rasmussen var fram til desember mánað í fjør formaður í Unga Sjálvstýri, og hann hevur verið valevni hjá flokkinum til tvey tey seinastu løgtingsvalini.

Nú hevur hann boðað formanninum í Sjálvstýrisflokkinum frá, at hann fer úr flokkinum.

– Tað er eingin vilji í Sjálvstýrisflokkinum til at gera nakað munagott við støðuna, sum flokkurin er komin í, sigur Kenneth Rasmussen sum orsøk til, at hann hevur takkað fyri seg í Sjálvstýrisflokkinum.

### Trupul tíð

Seinastu tvey løgtingsvalini hava verið tey vánaligastu í søguni hjá Sjálvstýrisflokkinum, og flokkurin hevur júst megnað at hórað undan omanfyri sperrumarkið.

Sjálvstýrisflokkurin hevur ikki havt somu styrkina eftir seinna veraldarbardaga, sum flokkurin plagdi at hava, men flokkurin hevur fyri tað mesta fingið millum 7 og 9 prosent av atkvøðunum til løgtinsvalini, og oftast hevur flokkurin havt tvey umboð í løgtinginum seinastu 25 árini.

Seinastu tvey valini hevur Sjálvstýrisflokkurin fingið ávíkavist 4,4 og 4,6 prosent av atkvøðunum, og á seinasta løgtingsvalinum fór Miðflokkurin fram um Sjálvstýrisflokkin og vann tveir tinglimir, meðan Sjálvstýrisflokkurin bara hevur eitt umboð í løgtinginum síðani 2002.

### Bátur á landi

Á landsfundinum hjá Sjálvstýrisflokkinum um vikuskiftið var flokkurin samanborin við ein bát, sum stendur á landið væl málaður og tilriggaður, men sum ongantíð fer á flot.

– Hetta er ein góð mynd av støðuni í Sjálvstýrisflokkinum. Flokkurin hevur ein góða grundhugsjón, sum tað framvegis er brúk fyri í føroyskum politikki, men flokkurin klárar ikki at gera nóg væl vart við seg. Flokkurin má taka nøkur mál og halda fast um tey, men tað er eingin veruligur vilji til at markera flokkin, sigur Kenneth Rasmussen.

Hann heldur, at løgtingsmaðurin hjá flokkinum, Kári P. Højgaard, ger tað, sum hann megnar fyri at fáa flokkin fram, og tað er eingin persónlig ósemja við hann ella flokkin, sum ger at fyrrverandi formaðurin í Unga Sjálvstýri fer úr flokkinum.

– Eg haldi, at tað er framvegis pláss fyri Sjálvstýrisflokkinum í føroyskum politikki, men eg havi tikið avgerð um, at eg tími ikki longur at brúka mína tíð til flokkin, sigur Kenneth Rasmussen, sum einki veit at siga um sína politisku framtíð.

# Tónleikur má víkja fyri norskum public-service

**Plássið á sendinetinum hjá Televarpinum er avmarkað, og nú ein nýggj norðurlendsk rás skal inn, verður ein altjóða tónleikarás koyrd út. Tað eru tær minst brúktu rásirnar, sum mugu víkja fyri teimum nýggjum**

TELEVARP

*Eyðun Klakstein*

*eydun@sosialurin.fo*



Meira norðurlendskt public-service sjónvarp, minni God Channel og einki VH1.

Tað verða broytingarnar, sum Televarpið fer at gera frá fyrsta degnum í apríl.

Televarpið hevur í eina tíð roynt at fingið meira norðurlendska sjónvarp í sítt útboð, og í fjør eydnaðist tað at fáa DR1 og DR2 umborð, og frá 1. apríl kunnu brúkarar av Televarpinum síggja norska NRK.

– Hetta er enn ein liður í at tryggja føroyingum dygdargott norðurlendskt sjónvarp og samstundis menna norðurlendska public service-rásúrvalið hjá Televarpinum, sigur Laila Hentze, stjóri á Televarpinum.

### Tónleikarás rýkur

Men hvørja ferð ein nýggj rás skal við í útboðið hjá Televarpinum, má onkur onnur rás víkja, tí plássið á sendinetinum er avmarkað.

– Vit brúka Gallup-kanning sum grundarlag undir valinum av rásum. Tá ið vit mugu taka onkra rás burturúr velja vit tí minst populeru rásina, sigur Laila Hentze.

Og tann minst populera rásin, nú NRK skal inn í hitan, er tónleikarásin VH1, sum hevur ein nakað eldri málbólk enn ungdómsrásin MTV.

### Gud verður fluttur

Samstundis verður ein broyting gjørd afturat, tí tøkniliga skal Danmarks Radio hava meira pláss til sínar tvær rásir, og tí mugu tvær aðrar rásir á Televarpinum leggjast saman. Frá 1. apríl verður God Channel tí at síggja á Rás 1 ein part av døgninum.

– Í fyrstu syftu verður tað helst soleiðis, at Rás 1 sendir um dagin, meðan God Channel sendir um kvøldið og um náttina. Men God Channel fer helst eisini at fáa ein blokk mitt á degnum eisini, sigur Laila Hentze.

### Breitt úrval hóast broytingar

Stjórin á Televarpinum roknar ikki við, at tað verða fleiri broytingar í úrvalinum av rásum næstu tíðina. Eftir at DR1 og DR2 og nú NRK eru komin við í úrvalið, er norðurlendski parturin styrktur munadi.

– Vit halda okkum hava eitt gott og breitt úrval av rásum. Vit kunnu bjóða norðurlendskt public-service sjónvarp, rásir hjá Viasast og Canal+ og føroyska sjónvarpið. Hetta er ein serstakur pakki, sum eingin annar kann bjóða, sigur Laila Hentze.

Fleiri enn 4000 kassar hjá Televarpinum eru úti millum fólk, og talið á kundum veksur støðugt. Í næstum koma Hvalvík og Streymnes upp í sendinetið og nakað seinni fær Kvívík eisini Televarpið.

Við hesari útbyggingini røkkur Televarpið uml. 75 % av føroysku húsarhaldunum.

# Millumbylgja er rokin

**Tað kann ganga upp í eitt hálvt ár, áðrenn millumbylgjusendarin hjá Útvarpinum á Akrabyrgi fæst at rigga aftur**

ÚTVARP

*Eyðun Klakstein*

*eydun@sosialurin.fo*

Tá ið Útvarp Føroya fór at senda sunnumorgunin riggaði millumbylgjusendarin í Akrabyrgi ikki. Sendarin hevur ikki riggað síðani, og um tað vil illa við, kemur sendarin ikki at rigga aftur fyrr enn um eitt hálvt ár.

Tað er avleiðingin av, at sendirørið er farið, og einki nýtt er á goymslu.

Sambært Útvarpinum kann tað taka upp í eitt hálvt ár at fáa eitt nýtt sendirør til vega, um tað ikki eydnast at fáa eitt brúkt sendirør frá onkrari útvarpsstøð uttanlands.

Tað er Føroya Tele, sum umsitir sendinetið vegna Vinnumálaráðið, og Føroya Tele hevur tríggjar ferðir síðani apríl 2003 gjørt vart við, at neyðugt er at keypa eitt nýtt sendirør at hava á goymslu. Føroya Tele heldur seg ikki klára at keypa sendirørið, sum kostar umleið 600.000 krónur, fyri tað rakstrarjáttan, sum felagið á hvørjum ári fær frá landinum til at halda sendinetið viðlíka.

Men hóast fleiri áheitanir á Vinnumálaráðið um at útvega pengar til at keypa nýtt sendirør fyri, eru ongir pengar komnir, og nú sendirørið í sendaranum er farið, er einki nýtt at seta ístaðin.

Bjarni Djurholm segði mikukvøldið við Útvarpið, at hann beinanvegin fer at gera eina roynd at útvega pengar til at keypa eitt nýtt sendirør fyri, og hann tók ábyrgdina í málinum á sín kappa, hóast hann róði fram undir, at Føroya Tele síðani 2003 hevur fingið 12 milliónir krónur til at viðlíkahalda sendinetið fyri, og at 600.000 krónur til eitt nýtt sendirør er ein lítil upphædd av hesum.

Millumbylgjusendarin í Akrabyrgi hevur syrgt fyri, at fiskimenn kunnu hoyra Útvarpið, men í upp til seks mánaðir mugu fiskimenn royna aðrar leiðir á millumbylgju fyri at hoyra útvarp.